MARKNAÐARRÁK

VIKA 21 2007

## KINA SETIR DAGSSKRÁNNA

Í vikuskiftinum kunngjørdi kinverski tjóðbankin fleiri tiltøk, sum hava til endamáls at tálma búskaparvøkstrinum og partabrævamarknaðinum. Árligi búskaparvøksturin er 11,1%, og kinversk partabrøv eru í miðal hækkaði stívliga 150% bert hetta seinasta árið. Nú ræður um hjá kinversku myndugleikunum at royna at tryggja, at serliga ógvusliga hækkandi partabrævamarknaðurin fer at slakka av aftur uttan eitt skrædl. Tiltøkini, sum vórðu sett í verk í vikuskiftinum vóru ein hækking av rentuni á 0,18%, umframt strangari solvenskrøv til bankarnar, og so loyva tey eisini kinverska gjaldoyranum, Yuan, at sveiggja meir í mun til dollaran.

Marknaðirnir á okkara leiðum fylgja væl við gongdini í Kina. Hetta sást m.a., tá partabrøv lækkaðu í februar. Lækkingin byrjaði í Kina.

## GJALDOYRU:

Kinverjar hava higartil keypt amerikonsk lánsbrøv, men rentuhækkingin fer at gera tað minni áhugavert og tí kann Yuan styrkna mótvegis dollaranum. Mótvegis krónuni er dollarin hækkaður eitt vet seinasta mánaðin men er framvegis veikur. Orsakað av ensku rentuhækkingini herfyri og útlit fyri einari aftrat innan árslok, meta vit at pundið næstu mánaðirnar verður styrkt. Tí mæla vit íleggjarum til ikki at selja pund enn.

## LÁNSBRÆVARENTUR STØÐUGAR

Lánsbrævarentur hava verið støðugar hesa farnu vikuna. 10-ára rentan er 4,38%. Lutfalsliga lítið hevur verið handlað, og útlit eru til, at renturnar halda á at hækka.

## HESA VIKUNA

Hesa vikuna verður størsti áhugin fyri álitistølum úr Týsklandi. Týskland er vorðið oddafiskur í evropisku framgongdini, og álitistølini vísa seg ofta at vera sera beinrakin fyri komandi gongdina.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1440,77 | + 1,81% |
| Alheims partabrøv | 8887,87 | + 1,4% |
| Atlantic Petroleum | 945,00 | + 15,95% |
| KB Trygg Eurostoxx | 111,05 | + 0,47% |
| USD | 553,46 | + 0,61% |
| JPY | 4,56 | -0,32% |
| GBP | 1091,15 | + 0,21% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK






Partaeigarafundir verða í umboðsdømunum kring landið í mai.
Í ár eru fundirnir merktir av, at 175 ár eru liðin, síðani Eik Banki varð stovnaður.

Í sambandi við stovningarárið letur Eik Gávugrunnurin 2 milliónir krónur í stuðuli til góð huskot við vælgerandi ella almannagagnligum endamáli. Á partaeigarafundunum verður almannakunngjørt, hvørji hugskot í teim ávísu umboðsdømunum fáa stuðul.

Atgongumerki til ábyrgdarafundirnar fáast á øllum deildunum hjá Eik.
Lýst verður á heimasíðuni www.eik.fo og í loftmiðlunum, nær atgongumerki í seinasta lagi skulu avheintast.

**Yvirlit yvir partaeigarafundirnar í Eik**

- 16. mai — Sandoy, Virkið á Sandi
- 18. mai — Suðuroy, Trongisvágs Skúli
- 21. mai — Norðurstreymoy, Ítróttarhøllin í Kollafirði
- 22. mai — Vágoy, Bygdarhúsið í Miðvági
- 24. mai — Eysturoy og Norðoyggjar, Ítróttarhøllin í Runavík
- 25. og 26. mai — Suðurstreymoy, Ítróttar- og samkomuhøllin á Hálsi

175

Partaeigarafundirnir byrja kl. 19.00 og enda uml. kl. 22.30. Hølini lata upp kl. 18.00

www.eik.fo

petur & petur 320 870